Januar 2025

betri trygging

# *Viðgerðartrygging*

## Vit tryggja tínum starvsfólkum tryggleika

Fleiri enn 40 starvsfólk



Prísur
1.933,-

# Viðgerðartrygging • Vit tryggja tínum starvsfólkum tryggleika

## Ein íløga í tíni starvsfólk

Bestu úrslitini eru ikki bara grundað á nýggjar maskinur, skilabetri arbeiðsgongdir og stykkjaprísir. Tey eru eisini grundað á frísk og glað starvsfólk við færri sjúkradøgum.

Ein viðgerðartrygging til tína fyritøku er ein íløga í færri sjúkradagar, og tað gagnar tínum ársúrsliti.

### Skjót atgongd til serlækna

Í seinasta lagi 10 yrkadagar eftir, at skaðafráboðanin hjá einum starvsfólki er góðkend, hevur viðkomandi verið til sína fyrstu kanning ella viðgerð hjá einum av okkara góðkendu serlæknum. Viðgerðarskipanin fevnir um góðskugóðkend privatsjúkrahús og privatar heilsustovur í Føroyum og í Danmark.

Skaðar og sjúkur, sum verða fráboðað, verða dekkað sambært galdandi tryggingartreytum – eisini skaðar og sjúkur, sum vóru staðfest, áðrenn tryggingin varð teknað.

### Fleiri viðgerðarmøguleikar

Starvsfólk tíni fáa við hesi viðgerðartrygging atgond til:

- Serlækna
- Psykiatara
- Zoneterapeut
- Massør
- Kiropraktor
- Ergoterapeut
- Fysioterapeut
- Akupunktør
- Fótarøktara
- Dietist
- Sálarfrøðing
- Bráðfeingis kreppuhjálp

### Minst til eisini at tryggja familjuna

Hjúnafelagar/samlivar hjá tryggjaðum starvsfólkum fáa eisini fyrimunir av at tekna sær eina viðgerðartrygging við sama góða dekningi og góða prísi.

**Prísur fyri hjúnafelagan/samlivan: kr. 1.933,- um árið**

Hjá hjúnafelaga/samliva fevnir tryggingin fyrstu seks mánaðirnar um sjúkur og skaðar, sum koma, eftir at tryggingin er teknað. Eftir seks mánaðir fevnir hon tó eisini um sjúkur og skaðar, sum komu áðrenn tryggingin varð teknað.

Um hjúnafelagi/samlivi hjá tryggjaðum starvsfólki eisini er fevndur av viðgerðartrygging eru øll børn teirra undir 24 ár eisini fevnd av tryggingini púra ókeypis – børnini skulu búgva í Danmark, Føroyum ella Grønlandi.

Gev gætur, at skaðar og sjúkur altíð verða dekkað sambært galdandi tryggingartreytum.

### Tilval – flutningur til viðgerðarstað

Tað er ein fyrimunur eisini at tekna starvsfólkunum sonevnt "flutningstilval". Harvið fáa tey endurgoldið ferðaútreiðslur í samband við góðkenda viðgerð ella útgreining á einum viðgerðarstaði í Danmark (aftur og fram).

Ynskja tey eisini at tekna flutningstilvalið fyri maka og børn, er prísurin pr. persón einans 880 kr. árliga (tøl fyri 2025).

### Soleiðis brúkar tú tryggingina

Tryggingin verður teknað hjá Betri Trygging, men verður umsitin av Gjensidige, og tí fara skaðafráboðanirnar beinleiðis til Gjensidige.

Um eitt starvsfólk verður sjúkt ella skatt - og tí krevur kanning ella viðgerð – boðar viðkomandi frá á **gjensidige.dk**. Á *"Min side"* er ein sjálvgreiðsla, har tey kunnu rita inn og fylla skaðafráboðan út.

### Samband

Vit á Betri Trygging eru klár at hjálpa tær, um tú ynskir at tekna eina viðgerðartrygging til fyritøkuna. Tú kanst ringja til okkum á tlf. 348600

Hevur tú spurningar um tryggingina ella hvat hon fevnir um, ert tú altíð vælkomin at ringja beinleiðis til Gjensidige á tel. +45 7010 9009. Tað er Gjensidige, sum tekur sær av skaðaviðgerðini fyri Betri Trygging.

Faktablað um hesa trygging finnur tú á heimasíðuni. Fleiri upplýsingar um tryggingina finnur tú í okkara tryggingartreytum.